Sosialurin



# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Herurin visti alt um handilin, og herurin gjørdi einki, uttan at Musharaf visti tað og góðkendi tað*

*Abdul Qadeer Khan*

# - Hann visti at vit lótu Norðurkorea fáa kjarnorkutøkni

**Maðurin aftan fyri kjarnorkuverkætlanina hjá Pakistan vil vera við, at landsins forseti, Pervez Musharaf, góðtók, at Pakistan seldi Norðurkorea kjarnorkutøkni**



*Pervez Musharaf. Visti hann, at Pakistan seldi Iran, Libya og Norðurkorea kjarnorkutøkni?*

*Mynd: Polfoto*

Fyri fýra árum síðani játtaði pakistanski kjarnorkuserfrøðingurin Abdul Qadeer Khan, at hann hevði latið myndugleikunum í Norðurkorea, Iran og Libya kjarnorkutøkni. Hann legði afturat, at hann hevði einsamallur ábyrgdina av gøluni.

Í vetur fekk Pakistan nýggja stjórn, og samstundis misti Pervez Musharaf, forseti, ein part av sínum valdi. Tað hevur havt við sær, at nú er Abdul Qadeer Khan til reiðar at siga eitt sindur meiri um tað, sum hendi, tá tey trý londini fingu kjarnorkutøkni úr Pakistan. Um vikuskiftið segði hann við amerikonsku tíðindastovuna AP, at Pervez Musharaf, forseti, var vitandi um og góðkendi, at Norðurkorea fekk kjarnorkutøkni úr Pakistan í 2000.

- Eitt norðurkoreanskt flogfar kom eftir tilfarinum, og stjórnarherurin var væl og virðiliga kunnaður um flogfarið og farmin, sum tað fór avstaðaftur við, segði Khan við AP. Í 2004 kom fram, at Norðurkorea hevði fingið pakistanska útgerð til at ríka uran við. Ríkað uran kann brúkast sum brennievni í kjarnorkuverkum og til at gera kjarnorkubumbur við.

- Stjórnarherurin visti alt, og hetta kann ikki vera hent, uttan at Musharaf gav tilsøgn um tað, segði Abdul Qadeer Khan. Tá tíðindamaðurin hjá AP spurdi kjarnorkuserfrøðingin, hví hann so tók alla ábyrgdina á seg í 2004, svaraði Khan, at hann hevði fingið at vita, at tað var best fyri landsins trygd. Harafturat hevði hann fingið lyfti um at sleppa undan revsing, um hann tók ábyrgdina á seg, segði hann.

- Men tað lyfti bleiv ikki hildið, segði Abdul Qadeer Khan, sum hevur sitið í húsavarðhaldi í Islamabad, síðani hann fyri fýra árum síðani avdúkaði kjarnorkusøluna.

Sjálvur hevur Pervez Musharaf ikki gjørt viðmerkingar til ta álvarssomu skuldsetingina, men í einari røðu um vikuskiftið segði hann, at hann hevur ongar ætlanir um at gera eftir kravinum frá andstøðuni um at fara frá.

# Trongligt við Nordkapp

**Altsamt fleiri velja at halda frí umborð á ferðamannaskipum, og Nordkapp er eitt av teimum væl umtóktu ferðamálunum**

Tað var trongligt í havnini í norðurnorska býnum Honningsvåg fyrradagin. Ikki færri enn seks ferðamannaskip vóru komin hagar við ferðafólki, men bara eitt teirra slapp at bryggju. Hini noyddust at liggja uttanfyri, og ferðafólkini máttu flytast aftur og fram smáum bátum.

Meiri enn 10.000 ferðafólk vóru við teimum seks skipunum. Nógv tey flestu nýttu høvi til at fara í land at hyggja seg um, og tað stóra ferðamálið var Nordkapp.

Áhugin fyri at vitja Nordkapp er so stórur, at Honningsvåg er vorðin ein av teimum mest brúktu ferðaskipahavnunum í Noregi. Hetta summarið vitja ikki færri enn 112 skip býin.



*112 ferðamannaskip vitja Honningsvåg í summar*

*Mynd: Nordlys*

## STUTT SAGT

# Merkel ímóti Mugabe

Týski kanslarin, Angela Merkel, dylur ikki fyri, hvat hon heldur um zimbabwiska forsetan, Robert Mugabe. Við AP-tíðindastovuna sigur hon, at ES fer at fremja øll hugsandi tiltøk fyri at fáa Mugabe og stjórn hansara frá.

- Vit fara at seta allar hugsandi revsiatgerðir í verk, og vit fara eisini at kanna, um vit kunnu avmarka ferðamøguleikarnar hjá zimbabwisku leiðarunum meiri enn higartil, sigur Angela Merkel við AP. Amerikanska stjórnin er eisini sera misnøgd við framferðina hjá Robert Mugabe, og George W. Bush, forseti, segði í síðstu viku, at USA fer at herða síni tiltøk ímóti zimbabwiska forsetanum og stýri hansara.



*Angela Merkel heldur lítið um Robert Mugabe*

*Mynd: AP*

# Flýddu til Spania

148 flóttafólk úr Afrika komu í gjár til Kanarisku Oyggjarnar í einum lítlum báti. Sponskumyndugleikarnir siga, at báturin, sum er úr glastrevjum, kom at landi á La Tejite-strondini á Tenerife gjáramorgunin. Flóttamenninir ætlaðu ivaleyst at sleppa upp á land í loyndum, men fremmand ferðafólk boðaðu myndugleikunum frá, skrivar Reuters. Tá løgreglan kom á staðið, royndu flóttafólkini at sleppa til rýmingar, men tað eydnaðist løgregluni at taka øll, og tey vórðu seinni latin umboðum fyri Reyða Kross. Eingi verður sagt um, hvørjum afrikonskum landi ella londum flóttafólkini eru úr.